**Innbjóðing til Ráðstevnuna Frændafundur 11, Háskóli Íslands,**
**Reykjavík 16.-18. august 2022**

Íslandsnevndin á Fróðskaparsetri Føroya og Føroyanevndin á Háskóla Íslands bjóða nú granskarum og framhaldslesandi at senda úrtak inn til íslendsk-føroysku ráðstevnuna Frændafund 11. Ráðstevnan, sum verður hildin triðja hvørt ár, verður í ár fyriskipað í samstarvi við Stovn Vigdísar Finnbogadóttur og Málvísindastovn Háskóla Íslands.

“Frændafundur” er høvuðstátturin í granskingarsamstarvi, sum varð skipað millum Fróðskaparsetrið og íslendska universitetið, Háskóla Íslands í 1990 og síðani er endurskoðað og víðkað í fleiri umførum. Á ráðstevnuni verða fjølbroytt evni viðgjørd í ymiskum vísindagreinum - einasti felagsnevnari er, at evnið á einhvønn hátt teingist Íslandi ella Føroyum. Ráðstevnan verður hildin á Háskóla Íslands 16.-18. august í ár. Tey, ið hava áhuga í at leggja fram á ráðstevnuni, verða biðin um at senda úrtak (300-400 orð) í seinasta lagi 1.apríl. Úrtakið skal latast inn á ráðstevnusíðuni á
EasyChair, leinki er niðanfyri:

https://easychair.org/conferences/?conf=ff11

Hevur tú ikki longu atgongd til EasyChair, er neyðugt at stovna vanga her:
https://easychair.org/help/account_creation

30 minuttir eru settir av til hvønn fyrilestur, og her er tíð til spurningar og kjak íroknað. Høvuðsmál á ráðstevnuni verður enskt, men tað verður tó imælt til, at framløgur í hugvísindum verða hildnar á føroyskum, íslendskum ella øðrum norðurlendskum máli. Framløgurnar verða skipaðar saman eftir evni, vísindaøki og máli. Tey, ið vilja skipa seg í bólkafyrilestrar við ávísum evni, verða biðin at venda sær til formannin í Íslandsnevndini, Tótu Árnadóttur (totaa@setur.fo) í seinasta lagi 15. mars.

Á ráðstevnuni verða hesir fimm høvuðsfyrilestrar:

**Amalía Björnsdóttir**, professari á Námsvísindadeild Háskóla Íslands: *Teacher education in Iceland and the Faroe Islands.*

**Knud Simonsen**, lektari á Náttúruvísindadeildini: *Tidal energy - a predictable renewable resource for the Faroe Islands.*

**Ingileif Jónsdóttir**, professari á Heilsuvísindadeild Háskóla Íslands: *COVID-19 in Iceland and the Faroe Islands, vaccination and other protective measures.*

**Ragnheiður Bogadóttir**, lektari á Søgu- og samfelagsdeildini*: What color is green energy? Long-term sustainability and energy transitions in the Faroe Islands in the past, present and future.*

**Sigríður Sigurjónsdóttir**, professari á Hugvísindadeild Háskóla Íslands: *Digital language contact with English and its effects on the Icelandic language environment. How do the Faroes compare?*

Á síðuni https://www.setur.fo/fo/gransking/granskingarsamstorv/granskingarsamstarvid-fraendafundir/ er ymisk kunning um undanfarnar Frændafundir at finna og leinki til íslendsku síðuna. Til ber eisini at venda sær til totaa@setur.fo við møguligum spurningum.

*Vegna Íslandsnevndina á Fróðskaparsetri Føroya*

Tóta Árnadóttir, FMD